


***Nr. 22*** ***27. oktober 2013*** ***73. árg.***

# Rætta pláss okkara

*Eg vil teg læra og vísa tær vegin, tú skalt ganga, eg vil hava eyguni eftir tær.*

*Sálmur 32,8.*

Hvat er tað, Gud ræður okkum at gera, tá ið hann hevur eyguni eftir okkum? Gud ræður okkum at finna rætta plássið, biddarans pláss. Tað dámar sjálvhjálpnum menniskjum ikki at hoyra. Tey siga, at tey skilja ikki, hvussu tað kann vera rætt. Men rætt er tað. Tá ið eygu Guds eru vend ímóti okkum, og vit hoyra kærleiksboðið: Tú skalt elska Harran Gud tín av øllum hjarta tínum og næstan eins og sjálvan teg, tá kann tað ganga upp fyri einum menniskja, at pláss biddarans er rætta plássið. Elska Gud av øllum hjarta mínum – elska næstan sum meg sjálvan, har standa vit í botnleysari skuld. Onki hava vit at gjalda við og biddarans kloddar eru klæði míni.

Hvat meira ræður Gud okkum til? Til kirkjuliðið í Laodikea verður í Opinberingini skrivað: ”Tí ráði eg tær, at tú keypir av mær gull, brent í eldi,….og hvít klæði, fyri at tú kanst klæða teg…..og salvu at smyrja eygu tíni við, fyri at tú kanst síggja.” Skilur tú, hvat tað merkir? Gud ræður okkum at leita á røttu støðunum og í bønini leita fram dýrastu gripirnar, sum vit við trúareygum hava sæð.

Hvat meira ræður Gud okkum. Hann ræður okkum at spyrja um vegin. ”Eg vil læra og vísa tær vegin, tú skalt ganga,” sigur hann, og trúgv er tað sama sum lýdni móti Guds vilja. Hann noyðir ongan, men ræður okkum, við at hava eyguni eftir okkum. Mangan vildu vit ynskt, at eitt bræv dalaði niður av himni við eini nágreiniligari lýsing av vegnum, sum vit skulu fylgja. Tað hendir ikki. Fet fyri fet leiðir Gud okkum fram eftir lívsins vegi. Tann, sum við opnum sinni spyr um veg, og sum roknar við Gudi, verður ikki sleptur upp á fjall.

”Eg Harranum lovi, ið ráð mær gav,” syngur Dávid í 16. sálmi. Hetta eru orð, sum tann lýdni lærusveinurin ferð eftir ferð ger til síni.

*Tú ferðamaður til halgan stað,*
*miss ikki Jesus úr eygsjón!*
*Ei villist tú í hans ferðalag',*
*miss ikki Jesus úr eygsjón!*

*Hans orð er lykt fyri fótum tær,*
*miss ikki Jesus úr eygsjón!*
*Tú liva skalt honum ævigt nær,*
*miss ikki Jesus úr eygsjón!*

# Millumstøðan

*Eftir hetta sá eg, og sí, stórur skari, sum ongin var førur at telja, av øllum fólkasløgum og ættum og tjóðum og tungumálum; teir stóðu frammi fyri hásætinum, skrýddir í longum, hvítum klæðum og høvdu pálmagreinar í hondunum.*

*Opb. 7,9.*

Øll ørindini frá 9-17 lýsa støðu teirra frelstu beint eftir deyðan – støðuna millum deyðan og uppreisnina. Hesi ørindini eru óivað hin ríkasta myndin í Bíbliuni av hesi støðu.

Tey vistu ikki um nakað annað til frelsu uttan Jesus Kristus. Við honum eru tey vorðin reinsað fyri alla synd og órættvísi. Og í millumstøðuni tæna tey Gudi dag og nátt. Nú er onki longur til, sum kann órógva tey, meðan tey halda gudstænastu.

Teimum trýtur onki, heldur ikki nakað at metta sálina við. Tey oysa í fullum máli úr øllum frelsukeldum. Hvørki mannahugsan ella syndalevnaður brongla lívið longur. Líðingin er burtur, saknurin er burtur, og hvørt tár verður turkað av eygum teirra.

Sum hetta er undursamt at hava í huga, um vit eiga fólk, sum fóru undan okkum í trúnni á Jesus Kristus! Og hetta undursama leggur ævinleikans álvara um dagar okkara. O, kundu vit livað æviskeið okkara at enda og gjørst verdig at staðið skrýdd í longum, hvítum klæðum fyri trúnuni!

*Ein dag so fellur henda búð –*
*ókendan tíma, dag og stund;*
*men Jesus Krist, tað veit eg nú,*
*mær reiðir búð í lívsins lund.*
*Eg frelstur skal úr synd og trá*
*andlit til andlit Jesus sjá.*

*Ein dag so søkkur sól í kav*
*og klæðir kvøldarskýggj í gull,*
*tá býður hann, sum lívið gav,*
*mær inn í høll so dýrdarfull.*
*Eg frelstur skal úr synd og trá*
*andlit til andlit Jesus sjá.*

*t.* týddi.

---

Kennir tú teg máttleysan, far so til Hansara, sum er hin almáttugi. *e.c.* ums.

# Frelsa

*”Tí at tað, sum var ómøguligt hjá lógini ... gjørdi Gud, við tað at hann sendi sín egna son.”*

*Róm. 8,3.*

Bíblian sigur frá hesi hending: Ein jødiskur ráðharri setti Jesusi ein dagin henda spurning: ”Meistari, sig mær, hvat ið eg skal gera, so at eg kann arva ævigt lív?” Jesus segði: ”Sel alt, sum tú eigur, og gev teimum fátæku pengarnar – tá skalt tú hava ein dýran grip í himli – og kom so og fylg mær!” Tá ið maðurin hoyrdi tað, fór hann tungur í huga haðani, tí at hann var ógvuliga ríkur.” Luk. 18,18-23.

Hesin maður hevði longu fingið viðburð og vald, framgongd og virðing. Men hann vildi tryggja sær eitt fínt endaúrslit: Hvat skal eg gera?” Enntá mátin, sum hann málbar seg, bendi á, at hann helt, hann kundi fáa ævigt lív, sum hann hevði fingið alt annað – við egnari megi. Hann hevði ta skeivu fatan, at tú bara kanst keypa tær eitt atgongumerki til Himmalin. Bara ein óblíður og kaldligur Gud fer at selja frelsuna til teirra, sum hava ráð at gjalda.

Tað er ringt at fata, tá ið vit eru so von við at fáa samsýning fyri okkara avrik. Men líka lítið, sum tú kanst gera Picasso bilsnan við tínari litaðu blýantstekning, kunnu títt lyndi og tínar góðu gerðir gera teg skikkaðan at koma inn í Himmalin. Ævigt lív kostar meir, enn tú hevur ráð til. Tí tørvar tær onga viðmælisbók – men tær tørvar ein Frelsara.

Pengar vóru eingin trupulleiki hjá hesum manni – hansara trupulleiki var, at hann hevði nóg mikið í sær sjálvum. Tað var ikki hansara inntøka, sum læsti vegin til Himmalin fyri honum, men hansara ego.

Og tað eru ikki bert tey ríku, sum hava ringt við at fata hetta. Soleiðis er tað eisini hjá teimum væl skúlaðu, teimum sterku, teimum vøkru, teimum væl umtóktu og enntá hjá teimum religiøsu. Um tú skalt taka ímóti frelsuni, mást tú fyrst sanna, at tú andaliga ert farin á húsagang, títt skáp er tómt, og títt umdømi hevur ongan týdning. Tú kanst ikki stíga fram fyri Gud og krevja rættvísi – tú kanst bara biðja um, at hann umber teg og er mildur. Og tað er púra vist, at um tú biður um tað í dag, so fært tú hansara náði og miskunnsemi við tað sama!

”… et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

# Gev børnum tínum hesar fýra lutirnar

*”Leið teir til mín, at eg má vælsigna teir.” 1. Mós. 48,9.*

Gev børnum tínum hesar fýra lutirnar.

**FRÁLÆRU**. ”Mugu undurverk hans hava gjørt eitt djúpt, ógloymandi árin á tykkum, so tit kunngera tað og geva tað víðari til tykkara børn og barnabørn!” 5. Mós. 4,9. Tað er ikki ábyrgdin hjá skúlaverkinum ella landsstýrinum at pota sannføringar og eitt gott skaplyndi niður í tíni børn – tað er títt arbeiði! Og Gud fer at krevja teg til svars fyri tað.

**UPPALING**. ”Aga tú son tín, tí at enn er vón.” Orðt. 19,18. Børn, ið vita hvussu langt, ið tey kunnu fara, sleppa undan at bera eina stóra byrðu. Tað gevur teimum eina trygd at vita, at tín myndugleiki er óvikiligur. Um tey læra, at nei av sonnum merkir NEI, gerast tey før fyri at siga tað við onnur og til síni egnu innskot.

**SIGNINGAR**. ”Ja,” segði Jósef, ”hetta eru teir synir, Gud hevur givið mær her í Egyptalandi.” – ”Leið teir yvir til mín,” segði Jákup, ”so eg kann vælsigna teir!” Fedrarnir í Gamla Testamenti løgdu hendur sínar á børnini, av tí at teir hildu, at Guds signingar kunnu flytast. Um eingin hevur gjørt tað við teg, skuldi tú gjørt tað við tíni børn og soleiðis sett eina nýggja siðvenju í verk, tí við Guds signingum fylgir friður, eitt langt lív og framgongd (les 5. Mós. 28). Fíggindin leypur ofta á teg, av tí at hann vil royna at slíta sambandið, har Guds signingar flóta ígjøgnum. Lat tað ikki eydnast honum!

**EITT GOTT FYRIDØMI**. Ein stórur prædikumaður hugdi einaferð niður á lítla son sín í vøgguni og bað: ”Harri, um tú nakrantíð hevur skapt ein mann, skapa so ein fyri meg nú. Lat lív mítt, mítt fyridømi og bønir mínar mynda hann, so hann gerst ein, tú kanst brúka. Og Harri, lat meg doyggja eitt samdøgur, áðrenn eg sigi ella geri nakað, sum fær hann at falla.”

”… et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 27. okt. | Tekstur: | Matt. 28,18-20; Áps. 10,1-8 og 34-35 og 39-43; | bíbliuorð: | Matt. 28,19a |
| 3. nov. | Tekstur: | Matt. 25,1-13; | bíbliuorð: | Matt. 25,13 |
| 10. nov. | Tekstur: | 2. Mós. 2,1-10; | bíbliuorð: | Jer. 29,11 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74